# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður

**Svarari:** Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

**Evni:** Sandoyartunnilin og ferðaætlanin hjá Bygdaleiðum í Sandoynna

**Spurningar:**

1. Hvussu gongst við arbeiðinum at gera Sandoyartunnilin lidnan, og nær letur hann upp fyri almennari ferðslu?
2. Hvør verður kostnaðurin fyri at koyra gjøgnum tunnilin við ávikavist persónbili, vøruvogni, lastbili og bussi?
3. Hvussu verða Bygdaleiðir skipaðar millum Havnina og bygdirnar í Sandoynni/Skúvoy?
4. Hvør verður kostnaðurin at koyra við Bygdaleiðum millum Havnina og bygdirnar í Sandoynni/Skúvoy?
5. Hvussu verður farleiðin út í Hest skipað, eftir at Teistin gevst at sigla í Sandoynna?
6. Hevur landsstýrið ætlanir at skipa suðuroyarleiðina um Sandoynna, meðan Suðuroyartunnilin verður gjørdur?

**Viðmerkingar:**
Gleðin um komandi Sandoyartunnilin er ovurhonds stór í Sandoynni, nú dagurin nærkast har koyrandi verður millum Streymoynna og Sandoynna.

Kunningin frá tunnilsfelagnum var jøvn og góð, meðan borað varð, men síðani síðsta skotið, hevur ikki verið nevnivert at frætt hvussu gongst við arbeiðinum.

Vísandi til ovurstóra áhugan í Sandoynni, og aðrastaðni í landinum við, verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

**Á Løgtingi, 19. august 2022**

Páll á Reynatúgvu